

– Eginleikin at fáa hugskot má haldast við líka. Um ikki, dovnar hann burtur, eins og vøddar, sum ikki verða brúktir. Tí ræður tað allatíðina um at vera forvitin og opin fyri, at tað altíð finnast øðrvísi mátar at fara fram, enn teir vanligu, sigur vevlistakvinnan, Tita Vinther, sum í ár fær Mentanarvirðisløn Landsins

Heiðraða vevkonan:

# Takksom fyri møguleikan at veva

**Sjálv kallar hon seg vevkona. Men at talan er um list á høgum støði, man stóra mentanarvirðislønin Tita Vinther nú fær, vera besta prógvið um. Tita fegnast um heiðurin, men er fyrst av øllum ómetaliga takksom fyri, at hon hevur havt møguleikan at sita stóran part av sínum lívi framman fyri vevinum**

SAMRØÐA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens K. Vang*

Hóast hon fekk tað at vita stutt fyri jól, er tað framvegis ikki rættiliga gingið upp fyri vevlistakvinnuni Titu Vinther, at tað verður hon, sum í ár fær størstu listarligu viðurkenningina, sum verður latin í Føroyum, nevniliga Mentanarheiðursløn Landsins.

– Eg havi fyrr nevnt, at tað eru so nógv onnur enn eg, ið hava uppiborið hetta. Men ongin ivi skal vera um, at eg eri ómetaliga glað og takksom fyri heiðurin, sigur Tita.

Í grundgevingini fyri at lata Titu Mentanarvirðislønina verður millum annað sagt, at hóast Tita ikki er uppvaksin í Føroyum, má hon metast at vera ein undangongukvinna í at nýta tilfar úr føroysku náttúruni til sína vevlist. Júst hetta hevur ivaleyst undrað fleiri, so vit hava biðið Titu greitt eitt sindur frá síni bakgrund.

## »Puslispælið«

– Eg eri fødd í Finnlandi í 1941, men longu sum hálvtannað ára gomul bleiv eg send til Danmarkar til fosturs. Kríggið hevði gjørt tað illa liviligt í landinum, og tí var tað ikki óvanligt, at foreldur sendu síni børn aðrastaðni við tí fyri eyga, at tey skuldu koma heim aftur, tá tíðirnar gjørdust betri. Hetta varð gjørt heilt einfalt í eini roynd at tryggja, at komandi ættarliðið yvirlivdi kríggið, greiðir Tita frá.

Tá Tita um skúlaaldur varð send aftur til Finland, fekst hon ikki at trívast í »nýggja« heimlandinum. Sjálv grunar Tita, at tað komst av, at hon var so ung, tá hon varð send avstað.

– Aldursmarkið, at senda børn av landinum, var trý ár, so tey máttu hava undantaksloyvi til at senda meg avstað. Men av tí at eg var so lítil, mintist eg onki til Finland, tá eg kom aftur og tosaði sjálvandi eisini bara danskt, fortelur Tita, sum bara vildi sleppa aftur til Danmarkar. Øll ungdómsárini var hon tí í Danmark hvørja summarferiu á tamb, og sjálvt um hon seinni gjørdi fleiri royndir at fella til í Finlandi, vildi tað ongantíð bera til.

17 ára gomul var Tita á háskúla í Danmark. Har hitti hon unga gøtumannin Suna Vinther, og so varð framtíðin hjá Titu spakuliga stungin út í kortið. Eitt stutt skifti flutti Suni til Finland, so unga parið kundi vera meir saman, áðrenn tey í 1960 fluttu til Føroyar, har tey giftust árið eftir.

– Ja, soleiðis sær mítt puslispæl í stuttum út, smílist Tita, sum hevur búð í Føroyum síðani.

## Úr Finlandi til Føroyar

Hóast frástøðuna til finska heimlandið í barnaárunum er tað haðani, áhugin hjá Titu fyri veving stavar. Hon minnist vevingina sum ein part av gerandisdegnum, har alt frá viskustykkjum til klæðir varð vovið í nógvum heimum.

– Tey vóvu fyrst og fremst, tí tað var neyðugt fyri eitt nú at fáa klæði upp á kroppin ella til at selja. Ivaleyst legði mann seg eisini eftir at skapa nakað vakurt, men nakað beinleiðis listarligt løgdu tey neyvan í hetta arbeiðið, sigur Tita, men leggur afturat, at onkuntíð gekk tað neyðuga og tað listarliga kortini upp í eina hægri eind. Til dømis var upprunaliga endamálið við veggjateppum at verja móti kulda í rúmum við grótveggum, har teppini ofta hingu soleiðis, at tú kundi lena teg afturat teimum. Sum frá leið varð størri og størri dentur lagdur á, at hesi veggjateppi eisini skuldu verða vøkur at líta á, og serliga Finland gjørdist kent fyri síni óvanliga vøkru rya-teppi.

Við íblástri úr finsku vevsiðvenjuni visti Tita rættiliga tíðliga, at hon vildi verða vevkona og fór sum heilt ung á sítt fyrsta vevskeið í Finlandi, har hon lærdi handverkið frá grundini. Komin til Føroyar gjørdist hon skjótt partur av blómandi vevumhvørvinum í Havn, har hon kom í samband við nakrar av okkara kendastu vevkonum, millum aðrar Marionnu Matras, Marjun Sigurðsdóttir og Olevinu Joensen.

– Tær vóru ótrúliga dugnaligar og ikki minst inspirerandi at vera saman við. Eg hevði til dømis ongantíð sæð ein rammuvev áður, tá Olevina byrjaði at halda skeið í rammuveving, sigur Tita, sum minnist mangar læruríkar og hugnaligar løtur saman við hesum kvinnum.

## Frá handverki til list

At føroysku vevkonurnar eisini fingu íblástur frá Titu, man lítil ivi vera um. Í einum ummæli av eini framsýning hjá Titu í 1982 er Marjun Sigurðsdóttir ikki í iva um, at vevingin hjá Titu er nakað heilt serligt, og at talan er um list heldur enn vanligt gagnverk. Millum annað heldur Marjun seg síggja ávirkan frá pólsku vevararnum í vevingini hjá Titu. Pólsku vevararnir gjørdust í 1960 unum slóðbrótandi innan vevlist í mátanum, teir vóru teir fyrstu at lata eginleikarnar hjá tilfarinum geva myndini sítt eyðkenni sum vovin mynd. Eisini lótu teir ljósið og rúmið gerast partur av myndini á ein hátt, so hon mest sum varð eitt skulpturelt verk í sær sjálvum.

Sjálv heldur Tita seg ikki hava havt eina meir listarliga tilgongd til vevhandverkið enn onnur. Tað er nakað, sum er komið við drúgvu royndunum og neyva innlitinum í sjálvt handverkið, heldur hon.

– Tað vilja ivaleyst altíð verða ymsar meiningar um, hvør munurin er á listhandverki og list. Sjálv eri eg sannførd um, at treytin fyri at skapa vevlist er, at tú dugir handverkið væl og virðiliga og hevur drúgvar